# Veðrið



**Fimmdagaforsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur ella skrið av suðri og útsynningi og fyrrapartin regn, seinnapartin ælingur, sum frálíður kavi. Hitin fellur niður í 0 til 3 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hvassur vindur av útsynningi og kavaælingur. Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og fyrrapartin yvirhøvur turt, men seinnapartin útsynningur og avfall eitt skifti, partvís kavi. Hitin kemur upp í 2 til 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og regn. Hitin millum 2 og 7 stig. Seinni klárar í við ælingi og kaldari.




*Myndatekstur: Føroyskt løgreglulið fer í næstum til USA at royna seg í eini fótbóltskapping hjá Secret Service*

# Føroyskt løgreglulið til USA

*Fara at luttaka í fótbóltskapping, sum Secret Service skipar fyri*

EYÐUN KLAKSTEIN

Eitt vælmannað føroyskt løgreglulið ætlar sær í næstum til amerikanska høvuðsstaðin Washington DC.

Har skulu teir luttaka í eini árligari fótbóltskapping, sum Secret Service skipar fyri. Føroyska løgreglan hevur fingið innbjóðing til hesa kapping, sum hevur til endamáls at savna pening inn til at menna lívskorini hjá teimum ungu í USA.

Vanliga er umleið 50 vaksmannalið við í kappingini, og flestu liðini koma úr USA, men á hvørjum ári verða útlendsk lið eisini boðin við. Í ár hava Slovakia, Bermuda og Holland boðað frá luttøku í kappingini. Í fjør vóru 15 ymisk lond við.

**Vælmannaðir avstað**

27 føroyskir løgreglumenn ætla sær við á ferðina til USA, sum verður í døgunum frá 15. til 22. mars. Ætlanin er, at løgregluliðið skal flúgva til USA umvegis Ísland. Búð verður á einum gistingarhúsið í Washington, og millum útferðirnar, sum skulu gerast í amerikanska høvuðsstaðnum, er sjálvandi ein til Hvítu Húsini.

Løgreglan var fyri tveimum árum síðani á líknandi fótbóltsferð í Hollandi, og aftur í ár ætla teir at fyrireika seg væl til kappingina.

Teir leggja dent á, at øll fyrireiking og kappingini fer fram í frítíðini, og tí órógvar hetta ikki arbeiðið hjá føroysku løgregluni.




Eitt lágtrýst, 997 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer móti Íslandi og dýpist.




Djúpa lágtrýstið við Ísland fer í landnyrðing og hevur nógvan vind við sær á okkara leiðum.




**Hitalagið mált frá 21./02. kl 06^00–22./02. kl 06^00. Hitin í gjár: 3,7°C**
Minsti hiti máldur í februar: **÷11,0°** Mesti hiti máldur í februar: **11,0°**




Avfallið: 2,2 mm – **mált frá 21./02. kl 6^00–22./02. kl 06^00**
Avfallið higartil í februar: 116,3 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷9 |
| Nuuk | ÷9 |
| Qaqortoq | ÷10 |
| Ammassalik | ÷7 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷2 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 9 |
| Tromsø | ÷3 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannahavn | 4 |
| Helsinki | ÷8 |
| Moskva | ÷6 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷7 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 10 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | – |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 11 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

## Vestfalskyrrindi

17. februar: Mánin næstur jørðini
19. februar: Fullmáni
27. februar: Seinna kvarter
28. februar: Mánin longst frá jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. feb. | 8:42 | 21:01 | 7:42 | 20:01 | 7:57 | 20:16 | 10:42 | 23:01 | 11:42 | — | 6:57 | 19:16 | 5:57 | 18:16 | 8:57 | 21:16 | 9:57 | 22:16 | 8:27 | 20:46 | 9:42 | 22:01 |
| 24. feb. | 9:20 | 21:40 | 8:20 | 20:40 | 8:35 | 20:55 | 11:20 | 23:40 | 0:01 | 12:20 | 7:35 | 19:55 | 6:35 | 18:55 | 9:35 | 21:55 | 10:35 | 22:55 | 9:05 | 21:25 | 10:20 | 22:40 |
| 25. feb. | 10:01 | 22:22 | 9:01 | 21:22 | 9:16 | 21:37 | — | 12:01 | 0:40 | 13:01 | 8:16 | 20:37 | 7:16 | 19:37 | 10:16 | 22:37 | 11:16 | 23:37 | 9:46 | 22:07 | 11:01 | 23:22 |
| 26. feb. | 10:46 | 23:12 | 9:46 | 22:12 | 10:01 | 22:27 | 0:22 | 12:46 | 1:22 | 13:46 | 9:01 | 21:27 | 8:01 | 20:27 | 11:01 | 23:27 | — | 12:01 | 10:31 | 22:57 | 11:46 | — |

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG




12. MAÐUR
Tlf. 213212

sosialurin
www.sosialurin.fo

fk